# Vónirnar eru altíð stórar



*Tað er ikki altíð, at tað gongur so øgiliga illa. Eitt nú eydnaðist tað hjá KÍ at vinna steypið, tá EB/Streymur í fjør varð sent heim við einum 3-1 tapi*

**Hóast tað so við og við er komið eitt slag av inflatión í stevnudystir, so stendur norðoyastevnudysturin framvegis sum nakað serligt hjá klaksvíkingum. Eisini hóast úrslitini mangan hava verið misjøvn**

STEVNUDYSTUR
*Jákup Mørk*

Tað verður B68, sum fær heiðurin av at vitja á Norðoyastevnu í ár. Ein dystur, ið sum so mangt annað telist millum ítróttarhendingarnar á norðoyastevnu.

Nú verða tað so ikki ítróttarligu útlitini fyri hesum dystinum, sum skulu viðgerast her. Tað verður helst gjørt væl og virðliga bæði undan og eftir dystinum.

## Nógv at siga

Hinvegin er altíð stuttligt at taka afturí, hvønn týdning stevnudysturin hevur fyri norðoyastevnuna. Stevnudystirnir eru við árunum vorðnir somikið nógvir, at teir ikki altíð standa líka høgt í metum, og eitt nú góvu havnarfeløgini at kalla avkall upp á sínar dystir, tá tey heldur kundu fáa pening fyri at lata steypafinaluna verða á ólavsøku. Ein dystur, har als eingin vissa er fyri, at havnarfeløgini eiga umboð yvirhøvur.

Soleiðis verður tó neyvan í Klaksvík. Fyrst og fremst tí norðoyastevnudysturin seinnu árini eisini er partur av fótbóltslandskappingini, men so sanniliga eisini, tí hesin dysturin hevur nakað at gera við samleikan hjá Klaksvíkini og norðoyastevnuni.

- Fyri stevnuna er so einki at ivast í, at dysturin hevur nógv at siga. Líka mikið hvør mótstøðan er, so eru altíð nógv fólk til dystin. Kanska fleiri klaksvíkingar enn vanligt, umframt at tað eisini plagar at vera heilt fitt av vitjandi fólki og hyggja.

Tað sigur Jan Gardar, sum er formaður í NFÍ, Norðoyar frítíðar- og ítróttarráð, og sum soleiðis eisini hevur stóran leiklut í tilrættisleggjanini av stevnuni.

- Ikki minst er hetta ein góður fíggjarligur biti hjá KÍ, sum eigur áskoðarainntøkurnar til dystin, men týdningurin fyri sjálva stevnuna er ikki at fara skeivur av. Hetta er ein fastur táttur, og so leingi nøkur norðoyastevnu verður, verður stevnudysturin eisini á skránni, heldur Jan Gardar.

Og so leggur hann afturat, tað at klaksvíkingar ganga so høgt uppí fótbólt, eisini ger, at hesin dysturin aloftast hevur stóran týdning fyri stevnuhýrin sum heild.

- Tað hevur jú ofta víst seg, at úrslitini hjá KÍ í hesum dystunum hava verið rættiliga misjøvn, og tað er avgjørt nakað, sum endurspeglast stevnukvøldini. Eg rokni ikki við, at tað er nakað annað stað, har fótbólturin hevur so stóran týdning, sum í Klaksvík, tí vil KÍ altíð vera samrøðuevnið, tá dystir hava verið, heldur hann.

## Trýstið órógvar

So tað er einki at ivast í, at tað liggur ein stór ábyrgd á KÍ-leikarunum, tá teir fara inn á vøllin. Spurningurin er so, hvussu teir megna at liva upp til hesa ábyrgdina, og í øllum førum hevur tað verið ógvuliga misjavnt, hvussu hetta hevur roynst seinnu árini.

Um tað er trýst ella órógv frá stevnuni ella kanska okkurt heilt triðja, sum ger seg galdandi, er ilt at vita, men í øllum førum hevur talan fleiri ferðir verið um vónbrot. Og onkun tíð um nøkur heilt stór av slagnum. Eitt nú tá fyrsti dysturin á nýggja graslíkinum varð taptur móti LÍF (við Kurt Mørkøre og Oddbjørn Joensen á liðnum) við ikki minni enn 4-1 í 1998. Ella ta ferðina í 1989, tá HB fór avstað við 7-1 sigri, ella tá EB/Streymur fyri tveimum árum síðani vann sín fyrsta landskappingarsigur tað árið við einum knúsandi 4-0 sigri. Tøl, sum snøgt sagt geva klaksvikingum marrudreymar, og sum í stóran mun eru viðvirkandi til at halda lív í søguni um, at KÍ altíð hevur tað strævið á norðoystevnudystinum.

## Ikki bara ímóti

Tað er tó ikki altíð, at úrslitini eru so nógv ímóti, sum tey vóru hesi omanfyristandandi árini. Eitt nú endaði stevnudysturin í fjør við sigri til KÍ, tá EB/Streymur aftur vitjaði. Hesa ferð fóru gestirnir tó heimaftur við ongum, eftir at KÍ hevði vunnið dystin 3-1. Tó eftir at hava verið aftan fyri í steðginum.

Í ár er so túrurin komin til B68, og so er spurningurin, hvussu tað fer at tørna út. Tað er í øllum førum heilt víst, at heimamenninir fara at spenna bogan høgt í royndunum at vinna dystin. Spurningurin er bara, hvussu hart hann verður spentur, og hetta merkir, at strongurin slitnar, ella um skotið verður beint í sentrum. Klaksvíkingar vóna í øllum førum tað seinna, men tað tað hevur bara víst seg, at vónir og veruleiki ikki altíð er í samsvar við hvørt annað, tá fótbóltur er á skránni á norðoyastevnu.





*Alexander Djordjevic trívist væl í Føroyum. Hann heldur, at landið er paradís fyri heilan hjá fólki, tí her ikki er so stressandi. Hann heldur, at fólk í Føroyum duga væl at gera sær stundir til at slappa av*

*Mynd: Jens K. Vang*

# Føroyar eru paradís fyri heilan

**– Eg havi nú búð her í umleið tvey ár, og mær dámar sera væl. Hetta má vera paradís, tí tað er so óstressandi. Fólkini eru blíð, og eg dugi væl at síggja meg sjálvan sum búgvandi her í framtíðini, sigur Alexander Djordjevic, sum spælir við 1. deild hjá KÍ. Hann og unnusta hansara, Joan, skulu giftast í summar**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*

– Faroes is paradise for brain and everything, sigur Djordjevic, tá hann verður spurdur um, hvussu hann trívist her. Hann flutti til Føroyar at búgva fyri umleið tveimum árum síðani at spæla fótbólt við KÍ. Hann heldur, at umhvørvið er ótrúliga sunt fyri sálina.

– Tað fyrsta eg hugsaði var, at hetta má vera perfekt, tí her eru so mong fjøll og hav allastaðni rundanum. Og lívið er ikki so stressandi her, sum tað er í Jugoslavia. Tú skalt altíð renna til okkurt har, og her ber tað til at taka tað róligt, tá ein er liðugur at arbeiða og venja. Hetta er bara gott, sigur Djordjevic, sum tosar enskt, men skilir nakað av føroyskum, um tað ikki verður tosað ov skjótt við hann. Sjálvur tosar hann sum sagt enskt, men fleiri føroysk orð hoyrast innímillum tey ensku, og tað ger hansara talumáta serstakan. Hann sigur, at hann ofta verður spurdur, um hann ikki kann tosa føroyskt, og hann royndi ta einu tíðina, men tað bleiv flent so mikið nógv at honum, at hann hálsaði umaftur til enskt beinanvegin, og við sannførdari rødd sigur hann, at honum tørvar tíð til at kunna seta seg inn í málið og koma at skilja tað fullkomuliga. Tosa tað, veit hann ikki, um hann nakrantíð fer at gera. Hann saknar ein skúla ella okkurt líknandi, sum hann kundi farið til fyri at lært seg tað føroyska málið.

Hann sigur, at tað var hart í fyrstuni, men tað gekk bara heilt stutt tíð, so byrjaði hann at trívast væl. Tað var Tomislav Sivic, sum setti seg í samband við hann og segði honum um Føroyar.

– Eg hugsaði beinanvegin, at eg mátti síggja hetta staðið við einans 5.000 íbúgvum, har øll kenna hvønnannan, sigur Djordjevic. Hann og Sivic kendust frammanundan frá fótbólti í Beograd í Jugoslavia. Sivic spældi ta einu tíðina við Reyðu Stjørnu, meðan Djordjevic spældi í hinum stórfelagnum í Beograd, Partizan.

Sostatt flutti Djordjevic frá professionellum fótbólti í Jugoslavia til amatør-fótbólt í Føroyum. Hann fekk arbeið hjá Klaksvíkar kommunu, og hann byrjaði at falla til. Tá kappingarárið var liðugt, fór hann aftur til Jugoslavia, men hann sigur, at hann vildi bara aftur til Føroyar. So hann var bara í Jugoslavia í stutta tíð og kom so aftur hendanvegin.

## Kríggj er ørskapur

Djordjevic sigur, at tað er ikki so stórur munur á londunum báðum, tá tað kemur til at øll kenna hvønnannan og tosa um hvønnannan. Tí hóast Beograd er ein stórbýur við 4-5 milliónum íbúgvum, so sigur Djordjevic, at úti í økjunum kennast øll væl og vita alt um hvønnannan. Men hann trívist væl í Føroyum, og í juli skulu hann og unnusta hansara, Joan, giftast.

– Tað verður fyrstu ferð, at eg fari í kirkju, sigur hann og á andlitsbráðnum hómast okkurt, sum kann kallast spenningur.

Tað eru nógv ymisk fólkasløg í gamla Jugoslavia. Landið, sum í dag er býtt upp í nógv smærri lond eftir eitt drúgt og ræðuligt borgarakríggj. Har eru eisini fleiri ymiskir trúarrættningar. Katolikkar, ortodoksar, muslimar og so framvegis.

– War was stupid, sigur Djordjevic við eitt sindur av beisksemi í røddini. Hann greiðir frá, at tað hevur ikki gjørt nakran mun fyri flestu jugoslavar, at tað gamla Jugoslavia nú er burtur, og at landið er býtt upp. Hann tekur seg sjálvan sum dømi. Mamma hansara er kroati og katolikkur, og pápi hansara er serbi og ortodoksur. Hetta hevði millum annað við sær, at hann vaks upp við tveimum jólaaftan og nýggjársaftan um árið. Tí ortodoksar halda jól 1. januar og nýggjár 13. januar.

– Hvat eri eg so? Eg eri jugoslavi, hóast landið í dag er burtur, sigur hann sannførdur á málinum. Hann heldur fram, at tað er sera torført at greiða frá krígnum.

– Kríggj er ørskapur. Fólk verða púra ør av tí, og tað hendi so nógv, sum í dag er púra óskiljandi, sigur Djordjevic, sum tó ikki sjálvur tók lut í krígnum. Hann gjørdi sína hernaðarskildu tann tíð tað var, og tað var tað hjá honum. Hann hevur spælt fótbólt á hægsta støði, síðani hann var 17 ára gamal, og eisini hevur hann verið aðrastaðni og spælt. Til dømis í Suður-Korea og í Avstralia.

Um framtíðina sigur Djordjevic, at hann heldur, at hann hevur nøkur ár eftir í sær sum fótbóltsleikari. Hann veit ikki at siga við vissu, hvat hann fer at gera, tá tíðin er komin til at gevast. Hann kundið hugsað sær at verðið venjari, men tað er ikki at vita frammanundan, um tað fer at eydnast honum.

Hann sigur í øllum førum, at hann kundi hugsað sær at verið verandi í Føroyum, men tað verður nakað, sum hann og komandi kona hansara endaliga fara at gera av.